

# Tað skal loysa seg at arbeiða

Øll fara at fáa skattalætta. Tað liggur fast í uppskotinum til skattaábót, sum Sambandsflokkurin miðar eftir.

Nýggjar kanningar vísa, at okkara skattatrýst er eitt tað harðasta í heiminum. Hóast skattalættar eru framdir fyri fleiri hundrað milliónir seinastu árini, er skattatrýstið økt trý prosent.

Sambandsflokkurin fer at virka fyri, at tað skal loysa seg betur at arbeiða.

Skattaábótin hjá Sambandsflokkinum skal fremjast stigvíst. Málið er sum frá líður, at hægsta skattastigið verður 40 prosent í staðin fyri 60 prosent, sum nú er. Botnfrádrátturin skal eftir fýra árum fara úr 22.000 krónum upp í 30.000 krónur.

Trupulleikin við verandi skipan er millum annað, at tú verður toppskattaður longu, tá ið tú vinnur 14.000 krónur um mánaðin. Tað markið skal hækkast til 25.000 krónur eftir fýra árum.

Skattareformurin hevur við sær, at skattainntøkurnar fara at minka 60 milliónir krónur árliga. Hinvegin fer hann at stimbra upp undir virksemið og harvið eggja til vinnuligan framburð.

**Sambandsflokkurin**
**- gott samstarv**